
Almennu stovnarnir



Nevndarformaðurin í Føroya Banka, Poul Johannes Johansen, heitir í formansfrágreiðing á landspolitikarar um at ansa eftir, at landsins umsiting ikki verður ov dýr og mælir til, at hugt verður eftir, um vit hava ov stóra umsiting, og um tað fer ov nógv dupult arbeiði fram innan umsitingina, um hon ikki kundi verið gjørd einfaldari.

Tá eg las greinina kom eg, satt at siga, at hugsa um flisina í bróðurs eyga og bjálkan í egnum eyga, men lat tað fara. Maðurin hevur uttan iva rætt í, at okkurt kundi verið gjørt øðrvísi innan ta almennu umsitingina.

Hyggja vit at gongdini síðani heimastýrið varð sett á stovn, so hevur í prinsippinum sama umsitingarskipan verið galdandi inntil fyri einum 4-5 árum síðani. Grundhugsanin aftan á heimastýrislógina var at hava ein ókompliseraða umsiting — annað var ikki tørvur á — og landsstýrið virkaði í stóran mun sum beinleiðis administratorur av umsitingini, har stovnsleiðarar frágreiddu beinleiðis til landsstýrismenninar í teimum einstøku málunum.

Umhvørvið

Okkara almenna umsiting verður sum mangt annað skapt av tí umhvørvi, ið er uttan um okkum og í samfelagnum og her er hent nógv seinastu árini. Serliga vil eg vísa á gongdina síðani 1970. Samfelagið er vorðið nógv meira kompliserað og okkara viðurskifti við útheimin somuleiðis, og sum ein natúrlig orsøk av hesum er stovnatalið eisini økt.

Tað er altið tungt at koma aftan á at skipa ella rationalisera eina umsiting, men hetta má gerast og best er, um hetta verður gjørt áðrenn umsitingin er vorðin alt ov stór.

Hetta sóu teir, sum sótu í landsstýrinum í tiðarskeiðinum frá 1970 til 1974 og varð tá fyrsta roynðin gjørd til at skipa umsitingina. Okkurt bendir á, at hesir vóru ov tíðliga á veg, tí arbeiðið varð steðgað og endaði í politiskum klandri, sum so mangt annað. Síðani hevur einki munagott verið gjørt fyri at skipa umsitingina í Føroyum fyrr enn í tiðarskeiðinum frá 1984-88.

Fyrimyndin donsk

Eftir minum tykki verður alt ov ofta drigin ein rúgva av skipanum til Føroya eftir danskari fyrimynd. Ístaðin fyri at tillaga okkara umsiting og skipanir eftir teimum umstøðum, vit hava her á landi, so taka vit ofta og avmynda danska umsiting, sum er góð og vælhóskandi til donsk viðurskifti.

Eg fylist á, at alt ov sjáldan verður hugt vestur um hav til Íslands, sum í veruleikanum hevur verið ígjøgnum somu stjórnarrættarligu støðu, sum vit í dag hava og sum hevur bygt upp sína egnu umsiting. Ikki tí, at eg vil peika á íslendsku umsitingina sum eitt ógvuliga gott fyridømi, men í hvussu er er ein stórur partur av mistøkunum, sum kunnu gerast við at skipa eina umsiting, gjørdir har, og er tað nakað vit eiga at læra av, so eru tað mistøk.

Í 1982 var eg við í einum arbeiði at gera eina kanning í Íslandi, sum hevði til endamáls at betra samskipanina av ymsum stovnum og samskipa keyp av amboðum og nýtslu av slíkum innan stovnar. Tá vóru í Reykjavík umleið 50 stovnar og eg øtaðist við og spurdi, hvussu teir ætlaðu at stýra hesum litla landi við einum sovorðnum veldugum yvirbygningi, tí 50 almennar sfovnar, tað ljóðaði at vera ógvuliga nógv í mínum oyrum.

Í dag hava vit í Føroyum eitt stovnstal, ið liggur onkunstaðni millum 50 og 60. Tá eigur eftir mínum tykki onkur reyð lampa at lýsa, og møguliga er tað henda reyða lampa, ið nú lýsir hjá nevndarformanninum í Føroya Banka.

Nýggjur bygnaður

Í 1984 ella undir seinasta landsstýri gjørdist greitt, at umsitingin var ikki nóg væl skipað. Tað komu ov nógv smá mál til politikararnar, sum so sótu og tóku ov nógvar umsitingarligar avgerðir. Landsstýrið metti tað tá at vera rætt at fara at hugsa um ein struktur ella ein bygnað (organisatión) fyri umsitingina. Hetta skuldi gerast á ein slíkan hátt, at hesir 50-60 stovnarnir, smærri og størri, skuldu setast í eitt mynstur, soleiðis at teir kundu verða nýttir sum eitt effektivt amboð til gagns fyri borgaran og til gagns fyri politikaran og soleiðis at politikarin kundi fáa tíð til at taka sær av tí, sum hann er settur til, nevniliga at taka politiskar avgerðir, sum umsitingin so kann arbeiða út frá.

Mær vitandi er ongantíð formliga nakar bygnaður settur upp ella teknaður, men at hetta er nú í umbúnað.

Út frá tí, eg havi sæð, og út frá teimum diskussiónum, sum vóru í 1986-87, hugsi eg, at myndin, sum eg her vísi av stovnunum, rættiliga væl lýsir, hvussu mynstrið í umsitingini er, ella hvussu mynstrið fer at vera.

Út frá hesum kann ein og hvør døma um, hvørjir stovnar eru ov nógv, um nakað dupultarbeiði verður gjørt, um uppbýtingin er bein o.s.fr., tað skal eg ikki koma inn á í hesi greinini.

Innlit og ábyrgd

Tað er heilt greitt fyri tann, sum hevur eitt sindur av innliti í umsiting, at verður hetta mynstrið gjøgnumført í veruleikanum — og tað er tað nógv, sum týðir uppá — so setir tað rættiliga stór krøv til allar partar, sum eru við í hesi skipan. Tað setir krøv til politikararnar at siga okkum, hvar ábyrgdin fyri ávísum málum liggur! Hvørjar avgerðir skulu á landsstýrisbord! Hvørjar uppgávur skulu stovnarnir loysa og mangt, mangt annað! Tað kann so vendast aftur til hetta seinni, tí her eru óivað nógv ymisk sjónarmið.

Ein ódámligur óvani, sum ofta hevur verið at sæð hjá politiskum myndugleikum — her hugsi eg bæði um løgtingið og landsstýrið — uttan mun til hvørjar flokkar talan er um, er, at tá nýggjar uppgávur koma, hevur ofta verið gjørdur ein nýggjur stovnur ella ein deild, sum skal taka sær av teimum nýggju uppgávunum. Tað hevur ikki verið hugt eftir, hvat er til taks av stovnum í umsitingini, ið loysa liknandi mál, og um tað er onkur, sum kundi átikið sær hesa nýggju uppgávuna, ístaðin fyri at vaða út á blámaan og gera ein nýggjan stovn.

Sparing og rationalisering

Nú eru tíðirnar soleiðis, at veldug krøv verða sett til umsitingina um at spara pening. Lat meg her gera vart við, tá tílík krøv verða sett til umsitingina, so eiga vit eisini at verða greið yvir, at tað eru stovnar, sokallaðir hálvalmennir stovnar, sum eru leysir av øllum sparikrøvum, og sum liva sítt »søta« lív, uttan at politiski myndugleikin tykist at hava nakra ávirkan.

Tá ið vit tosa um sparingar og rationaliseringar hava vit lyndi til — hetta hendir kanska einamest í smáum samfeløgum — at fara út í eina sokallaða »primitiva rationalisering«, har vit uppsiga fólk á lægsta stigi. Vit hoyra um fyritøkur, sum uppsiga kantinupersonalið, vaskifólk o.s.fr. Tað er ofta og tíverri soleiðis, at lagt verður á, har garðurin er lægstur. Henda »primitiva rationaliseringin« gevur tó bert løtuvinning, og hon er ikki nakar góður máti at loysa trupulleikarnar uppá. Hon skal sjálvsagt eisini vera, men skulu vit gera langtíðarloysnir og langtíðarrationaliseringar, so skulu vit inn í tað sum eitur strukturrationaliseringar.

Hetta er tað, sum nevndarformaðurin í Føroya Banka eftirlýsir, og eri eg púra samdur við honum.

Flyta fólk á høgum støði

Strukturrationalisering er, at vit broyta mynstrið í okkara organisatiónum. Vit mugu t.d. leggja deildir saman. Vit mugu leggja stovnar saman, ella vit býta stovnar og deildir sundur. Stutt sagt, vit mugu broyta strukturin.

Hetta inniber, at vit ofta koma at flyta fólk á høgum støði. Tað kunnu vera deildarleiðarar, tað kunnu vera stjórar. Í vissum førum koma vit at traðka fólk á tærnar, sum sita høgt uppi í organisatiónini — og nú eru vit á einum øki, har fólk á ein hátt hava betri atgongd til politikararnar, har fólk hava betri møguleikar at spæla uppá »taka synd í« problematikkin. Tað er heilt ótrúligt, hvat flyting av persónum á høgum støði kann innibera av trupulleikum, ja, nógv meira enn at siga einum hundrað fólkum upp á lægsta stigi. Skúlagølan í Vági er eitt gott dømi um hetta.

Eingin ivi er um, at skal umsitingin í Føroyum virka væl framyvir, og møguliga virka betur innanfyri somu kostnaðarætlan, sum vit hava í dag, so mugu vit inn í strukturbroytingar og taka teir vansar, sum standast av tí.

Her er ikki altið neyðugt at siga fólki upp, men heldur at flyta fólk til aðrar deildir ella stovnar. Tað skuldi ikki verið so trupult, tí tá sendir tú ikki fólk út í svartasta arbeiðsloysi.

Læra av íslendingum

Vit hyggja ofta eftir Íslandi, tá talan er um stovnsrøkt innan fiskastovnar, men eg vil mæla føroysku politikarunum til at seta seg meira inn í, hvussu íslendingar hava stovnsrøkt av teirra statsligu stovnum og tey mistøk, ið har eru gjørd. Stovnar gera dupult arbeiði, og har, sum her hjá okkum, eru stovnshøvdingar, sum sita í sínum egna kongariki og hava ikki tann samfelagsliga sjónarringin, sum krevjast má av eini stovnsleiðslu.

Samanumtikið má sigast, at tað er beint, at vit taka spurningarnar um umsitingina upp til viðgerðar, og at teir verða lýstir í eini størri framtíðarmynd.

Umsitingin av samfelagnum er eingin løtt uppgáva, heldur hevur hon nógvar tvørleikar við sær, men vit kunnu ikki byggja eina umsiting upp á sama hátt, sum í teimum stóru londunum. Tað eru vit ikki førir fyri og hava heldur ikki ráð til.

15/3-1990

Thomas Arabo

